**Avtalan ímillum Føroyar og Danmark um fíggjarpolitikk**

**I hesari avtaluni ímillum Danmark og Føroyar verður staðfest, at landsstýrið hevur ábyrgdina av fíggjarpolitikkinum í Føroyum**

ARTIKEL 8

Ansvaret for den økonomiske politik:

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at ansvaret for den økonomiske politik på Færøerne, herunder for fremtidig låneoptagelse og garantistillelser, indenfor de rammer som følger af hjemmestyreloven, ligger hos Landsstyret. Herved er samtlige begrænsninger i Landsstyrets låneoptagelser og garantistillelser bortfaldet.

Brot úr avtalu frá 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Føroya Landsstýrið

# Høgni Hoydal skapar øsing ímillum føroyingar og danir

**Høgni Hoydal og tjóðveldisflokkurin dragsa føroyskan politikk niður til Danmarkar við einum einasta endamáli og tað er at øsa danir upp ímóti føroyingum, sigur løgmaður**



*– Tjóðveldisflokkurin livir av at ósemjur eru ímillum Føroyar og danir og tí royna teir, hvat teir kunnu at festa eld í aftur og tað er ógvuliga átaluvert, heldur løgmaður*

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er at draga innanhýsis føroysk viðurskifti niður til Danmark, har tey ikki hoyra heima.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, heldur, at tað er hugstoytt, at tjóðveldisflokkurin og norðuratlantsbólkurin hava skipað fyri ráðstevnu í Keypmannahavn, har føroyskur fíggjarpolitikkur og ríkisveitingin vóru høvuðsmálini.

Hann ásannar, at tað er ein partur av fólkaræðinum at halda ráðstevnur so tað hevur norðuratlantsbólkurin fullan fólkaræðiligan rætt til.

– Men tað løgna við hesari ráðstevnuni, var, at í hesum føri var talan um at leggja innanhýsis viðurskifti í Føroyum fram fyri danir at kjakast um.

Hann minnir á, hvussu stórar trupulleikar, føroyingar høvdu undir kreppuni av, at danir løgdu seg uppí alskyns, føroysk viðurskifti, eisini viðurskifti, sum vóru yvirtikin.

– Tí var dagurin 10. juni 1998 ein ógvuliga gleðiligur dagur, tí tá gjørdu føroyingar og danir eina avtalu, sum staðfesti, at ábyrgdina fyri búskapinum í Føroyum, lá í Føroyum.

Men tað, sum hendir við hesari ráðstevnuni, er, at føroysk málsøki verða drigin til Danmarkar at verða umrødd.

– Hetta er beinleiðis at skaða áhugamálini hjá landsstýrinum, sigur løgmaður.

– Blokkurin hevur stóran týdning, serliga í dag, nú vit dragast við hall á fíggjarlógini. Var blokkurin ikki, var hallið á fíggjarlógini í ár 800 milliónir og so vóru vit í djúpari kreppu.

Á ráðstevnuni var ein høvuðsboðskapur, at blokkurin var við til at hita føroyska búskapin. Og eftirspælið er tað, at danskir politikarar siga, at er blokkurin til skaða fyri føroyingar, má hann endurskoðast.

– Tað er átaluvert, at ein ávísur flokkur fer, uttanum landsstýrið, til Danmarkar, sáa iva um ein so týðandi part av okkara búskapi, sum blokkurin uppá 600 milliónir, er.

– Hvat vit brúka blokkin til, kemur ikki dønum við, Tað er staðfest í avtaluni frá 1998, at føroyingar hava sjálvir fullu og endaligu ábyrgdina av fíggjarpolitikkinum.

Jóannes Eidesgaard sigur, at sostatt er Høgni Hoydal í fullari ferð við at bróta eina týðandi avtalu við danir, sum hann sjálvur var við til at gera.

– Tað ger Høgni Hoydal og tjóðveldisflokkurin við at leggja føroysk málsøki yvir til danir til kjak.

– Tað er eisini undarligt, at nú tjóðveldisflokkurin ásannar, at hann ikki fær undirtøku fyri sínum politikki í Føroyum, so fer hann til Danmarkar fyri at fáa danskar politikarar at taka undir við sær og sostatt at fáa síni frama fyri sínum sjónarmiðjum ígjøgnum bakdyrnar.

## Vil skapa øsing

Jóannes Eidesgaard er sannførdur um, at endamálið við hesi ráðstevnuni var ikki at fáa meiri vitan til vega.

– Vit vita øll, at tann spenta støðan ímillum Føroyar og Danmark bjargaði tjóðveldisflokkinum í nítiárunum. Men teirra stóri trupulleiki í dag, er, at tað er ov friðarligt ímillum Føroyar og Danmark. – Tí royna teir sjálvir av øllum alvi at sáa split í ímillum londini bæði og at festa eld aftur í ósemjurnar ímilllum Føroyar og Danmark

– Tað gera teir við at fara til Danmarkar at seta sjóneykuna á blokkin til Føroya, fyri sostatt at seta kílar ímillum føroyskar og danskar politikarar.

– Men meiri álavarsamt er tað, at hetta er eisini við til at seta kílar ímillum meiniga danan og føroyingar.

– Tað leikaði rættiliga hart á í kreppuni og mangan tordu føroyingar ikki at viðurkenna, at teir komu úr Føroyum. Men teir brotasjógvarnir løgdu seg og seinastu árini hevur tað verið rættiliga friðaligt ímillum Føroyingar og danir. Og serliga eftir, at avtalan frá 1998, gjørdi støðuna greiða, hevur at kalla ongir samanbrestir verið.

– Tí er tað ótrúliga átaluvert, at ein føroyskur politikari setir sær sum mál at seta kílar ímillum danir og føroyingar, soleiðis sum tjóðveldisflokkurin nú hevur gjørt við hesi ráðstevnuni.

Løgmaður sigur, at tað er heilt óskiljandi, at júst tjóðveldisflokkurin skal fara at avreiða málsøki, sum eru føroysk, niður aftur til Danmarkar, tí hjá tjóðveldisflokkninum er tað aðalmálið, at í Føroyum skulu føroyingar ráða.

Hann vísir á, at í kjalarvørrinum á hesi ráðstevnuni hevur enntá eitt kjak í Danmark tikið seg upp um føroyskan skattapolitikk og um frádráttin, sum føroyskir fiskimenn fáa.

– Vit kunnu vera ymisk á málið um fiskimannafrádráttin. Men tað eru ikki danir, sum skulu hava eina meining um tað, tí skattamál vóru yvirtikin í 1948.

– Tjóðveldisflokkurin hevur altíð tvíhildið um føroyskan sjálvsavgerðarrætt. Flokkurin gekk á odda at leggja donsku ríkisveitingina í ein blokk, júst fyri at fáa sjálvsavgerðarrættin yvir honum.

Men nú ger flokkurin tað beint øvugta, tí nú fer hann aftur til Danmarkar at tosa við danir um, hvat blokkurin verður brúktur til.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann dugir ikki at síggja nakað annað endamál við hesum enn at royna at skapa øsing ímillum føroyingar og danir og at seta tjóðirnar upp ímóti hvørjum øðrum.

# Vil hava danir at hjálpa sær við tí sum ikki gekk í Føroyum

**Tá ið Høgni Hoydal sat í landsstýrinum, vildi hann hava 12-15 ára skiftistíð í sambandi við loysingina frá Danmark. Nú hann er í andstøðu, og tíðirnar eru farnar at versna, heldur hann, at 6-8 ár eru nóg miki, sigur Bárður Nielsen**

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Tað er ikki rætt at dragsa føroysk málsøki til Danmarkar at verða viðgjørd.

Heldur ikki Bárður Nielsen er serliga fegin um ráðstevnuna, sum tjóðveldisflokkurin og norðuratlantsbólkurin hildu í Keypmannahavn herfyri og har føroyski blokkstuðulin varð høvuðsmálið.

Hann staðfestir, at hóast hann hevur er landsstýrismaður í fíggjarmálum og sostatt er ovasti politiski myndugleiki í Føroyum í fíggjarmálum, varð hann ikki boðin at halda røðu á ráðstevnuna.

– Vildu tey havt at vita, hvat landsstýrið helt, hevði verið natúrligt at bjóða einum umboði fyri landsstýrið við.

– Tað heldur hann, var eitt sindur undarligt, serliga tá ið ávísir politikarar úr Danmark vóru við.

Annars viðurkennir Bárður Nielsen at tjóðveldisflokkurin og norðuratlantsbólkurin hevur fullanrátt at hava eina slíka ráðstevnu.

Men hann heldur ikki, at tað er rætt at fara til Danmarkar at viðgera føroyskan fíggjarpolitikk.

– Slíkt kjak hoyrir heima í Føroyum og ikki ímillum danskar politikarar og í donskum fjølmiðlum.

Men Bárður Nielsen er sannførdur um, at tjóðveldisflokkurin hevur bara eittans endamál við eini ráðstevnu, sum hesari:

– Tjóðveldisflokkinum sat í samgongu í seks ár, men hann kiksaði, tí vit fingu hvørki sjálvstýri ella ein sjálvberandi búskap og blokkurin varð heldur ikki skorðin burtur.

– Eg dugi heldur ikki at síggja, hvussu blokkurin kann verða skorðin enn meiri í næstu framtíð.



*Í 2001 vóru betri umstøður at taka eina skiftistíð uppá 4 ár enn tær eru at taka eina skiftistíð uppá 6-8 ár nú, sigur Bárður Nielse*

Og tað, sum miseydnaðist í Føroyum, fer flokkurin til Danmarkar at fáa danir at skerja blokkin fyri okkum, ímóti politiska viljanum í Føroyum.

Hann heldur, at við hesum tiltakinum er okkara sjálvavgerðarrættur á fíggjarliga økinum partvís tikin frá okkum og tað er ógvuliga óheppið, sigur landsstýrismaðurin.

Men tað er næstan sum um at tjóðveldisflokkurin vilja hava danir at leggja seg út í føroysk viðurskifti.

– Hetta kann kom at skapa spenningar ímillum føroyskar og danskar politikarar og ímillum vanligar danir og føroyingar og tað er ómetaliga óheppið.

– Men tá ið slíkir upplýsingar um at blokkstuðulin og, hvat hann verður brúktur til, koma upp, noyðast danskir politikarar at taka tað upp.

## Undarligt

Bárður Nielsen vísir eisini á, at tá í tjóðveldisflokkurin sat í samgongu í bestu tíð í Føroyum nakrantíð, vildi hann hava danir at góðtaka eina skiftistíð upp á 12-15 ár, fyri ikki at taka grundarlagið undan føroyska búskapinum. Men danir vildu bara geva 4 ára skiftistíð.

Men nú, flokkurin er í andstøðu, og tíðirnar eru farnar at versna, heldur hann, at blokkurin kann skerast burtur uppá 6-8 ár.

– Í 2001 vóru umstøðurnar at taka eina skiftistíð uppá fýra ár munandi betri enn tær eru at taka eina skiftistíð upp á 6-8 ár nú, sigur Bárður Nielsen.

# Føroyingar farnir undir skaðiligt virksemi í Danmark

**Við sínum virksemi í Danmark, er Tjóðveldisflokkurin farin at øsa danir upp ímóti føroyingum, samstundis sum teir eru í ferð við at máa støðið undan eini avgerandi avtalu ímillum Føroyar og Danmark**

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er onki minni enn landsskaðiligt virksemi.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður og varaløgmaður er alt annað enn fegin um ráðstevnuna um, sum norðuratlantsbólkurin helt á Christiansborg herfyri.

Hann leggur dent á, at tjóðveldisflokkurin og norðuratlantsbólkurin hava fullan rætt til at halda tær ráðstevnur, teir vilja.

Men hann sigur, at við hesum tiltakinum beinleiðis eggjar tjóðveldisflokkurin dønum til at leggja seg út í føroyskan politikk.

Bjarni Djurholm minnir á tey sera spentu viðurskiftini, sum vóru ímillum danir og føroyingar í kjalarvørrinum á kreppuni.

– Tá gingu tjóðveldisfólk á odda at skuldseta danir fyri at leggja seg út í føroyskan politikk og at taka føroyingar av ræði.

– Støðan var rættiliga spent tá. Politiskt var stór ósemja ímillum danir og føroyingar. men eisini imillum vanliga danan var ein rættilig øsing ímóti føroyingum.

## Fingu alla ábyrgdog allan myndugleika

Bjarni Djurholm sigur, at í juni 1998 eydnaðist tað kortini landsstýrinum at fáa eina avtalu við donsku støjrnina sum staðfestir, at ábyrgdin fyri fíggjarpolitikkinum í Føroyum, liggur hjá Føroya Landsstýri.

– Í hesi avtaluni verður staðfest púra greitt, at ábyrgdin og myndugleika fyri fíggjarpolitikkinum í Føroyum liggur hjá landsstýrinum.

– Síðani hevur verið fullkomiliga friður í viðurskiftunum ímillum Føroyar og Danmark.

Men nú hendur so tað, at tjóðveldisflokkurin og Norðuratlantsbólkurin fara til Danmarkar at halda eina ráðstevnu um føroysk viðurskifti, har danski blokkstuðulin til Føroya er eitt høvuðsmál.



*– Tjóðveldisflokkurin livir av at skapa øsing ímillum Føroyar og Danmark og tí royna teir aftur nú at øsa danir upp ímóti føroyingum, sigur Bjarni Djurholm.*

– Sostatt er tjóðveldisflokkurin farin at sáa iva um tann sjálvavgerðarrætt, vit fingu í avtaluni frá 1998.

– Og tað er rættiliga hugvekjandi, at tað júst skal vera tjóðveldisflokkurin, sum fer so vítt, sigur Bjarni Djurholm.

– Hetta er at draga føroyskan fíggjarpolitikk niður til Danmarkar, har hann als ikki hoyrir heima og tað er rætt og slætt landsskaðiligt virksemi.

## Føroyingar eru eitt oyðiland

Bjarni Djurholm sigur, at høvuðsboðskapurin á hesi ráðstevnuni hevur verið, at føroyingar fáa hundraðtals milliónir frá dønum um árið, sum vit í roynd og veru blaka burtur og at vit eru eitt oyðiland.

– Hetta er tað saman sum at fortelja dønum, at føroyingar eru ábyrgdarleysir og tað mátti ikki sømt seg.

– Men við hesi framferðini, er Tjóðveldisflokkurin sostatt í ferð við at avreiða tað avtaluna, sum vit fingu í 1998 og har tað er staðfest, at vit hava sjálvi ábyrgdina av okkara fíggjarpolitikki.

– Hetta er onki minni enn eitt bakbit ímóti teimum avtalum, vit gjørdu við danir í 1998, leggur hann afturat.

– Tað er ringur fuglur, ið drýtur í egið reiður, men tað er júst tað, sum tjóðveldisflokkurin hevur gjørt.

Bjarni Djurholm sigur, at í kjalarvørrinum á hesi ráðstevnuni, hevur aftur ein øsing tikið seg upp ímóti Føroyum, bæði ímillum politikarar og ímillum vanliga fólki í Danmark.

– Og nú er enntá føroyskur skattapolitikkur drigin upp í kjakið og sjálvt føroyskir fiskimenn eru drignir uppí. Hann sipar til, at nú eru eisini danir farnir at finnast at frádráttinum, sum fiskimenn fáa.

– So langt er tjóðveldisflokkurin farin, staðfestir Bjarni Djurholm.

## Vilja skapa øsing

Bjarni Djurholm heldur, at ráðstevnan hjá tjóðveldisflokkinum er ómetaliga óheppin fyri føroyskan politikk, serliga tá ið vit minnast til, at framgongdin í føroyska búskapinum er við at venda og at tað tískil liggja ovurhonds stórar avbjóðingar fyri framman hjá landsstýrinum fyri at fáa javnvág á fíggjarlógina.

– Samstundis verður avleiðingin tann, at vit nú mugu at brúka drúgva tíð og nógva kreftir upp á at sannføra danir um, at vit eru ikki so ábyrgdarleys, sum hendan ráðstevnan hevur málað á veggin

Bjarni Djurholm sigur, at hendan ráðstevnan tænir ongum endamáli enn at øsa danskar politikarar og vanliga fólki í Danmark upp ímóti føroyingum.

Men hann ivast ikki í, at júst tað er endamálið hjá tjóðveldisflokkinum.

– Tjóðveldisflokkurin brúkar eitthvørt høvi til at gera vart við seg pollititiskt. Vit sótu í samgongu í seks á, men hjá tjóðveldisflokkinum var yvirtøku- soðið rættiliga tunt, tí teir megnaðu ikki at yvirtaka eitt tað einasta mál. Og tá ið tað fór at sansa at, tók hann til rýmingar úr samgonguni.

Bjarni Djurholm heldur, at tað er tænir tjóðveldisflokkurin til lítlan sóma, at hann nú fer til Danmarkar at skapa sær ein nýggjan, politiskan front.

– Endamálið hjá tjóðveldisflokkurin er at halda fast um tað sera spentu støðu, sum var ímillum Føroyar og Danmark í kreppuárunum og tí fara teir nú til Danmarkar at skapa øsing um blokkstuðulin.

– Hendan áhaldandi misnøgdin ímillum Føroyar og Danmark eigur lívið í tjóðveldisflokkinuma og tí royna teir aftur at skapa øsing í Danmark ímóti Føroyum. Og tí er tað eisini avgerandi fyri tjóðveldisflokkin at halda pottinum í kóki.

– Og tá ið tað vísir seg, at teir ikki fáa undirtrøku fyri sínum politikki í Føroyum, gera teir ikki mætari, enn at teir fara til Danmarkar at draga danskar politikarar og danska almenningin upp í. fyri at fáa tey at hjálpa sær.

Annars siga tjóðveldismenn, at ongin røðari var valdur útfrá politiskum orsøkum og at endamálið var einans at fáa vitan?

– Eg kann bara minna á, at tann eini høvuðsrøðarin (Hermann Oskarsson, blm) var í uppskoti til at vera valevni fyri tjóðveldisflokkin til løgtingsvalið. Meiri er ikki neyðugt at siga um tað, sigur Bjarni Djurholm.